handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2003 BLAÐ NR. 8 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



Partafelagið

Tórshavnar Skipasmiðja

Lærubræv

hevur verið lærutíð sína á ... og verður tað her váttað.

Tórshavn, t.

Lehrbrief.

hat in ... als ... seine Lehrzeit vollendet, was hiermit bescheinigt wird.

Letters of apprenticeship.

has served his time in ... a ... as which is by these presents certified.

Tórshavn t.

# Nøkur uppskot, sum ikki vunnu frama

Nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður 7. oktober 2003. Í hesum sambandi er vert at nevna, at vit høvdu fleiri uppskot til broyting í sáttmálanum, sum tí verri ikki vunnu frama í hesum umfari. Hóskandi er her at nevna nøkur fá dømi, sum vit eiga at taka fram aftur, tá vit í 2005 aftur fara til samráðingar:

§ 4 frídagar: Strika aftaná kl. 12 fyri allar frídagar.

Samanborið við verandi sáttmála: Flaggdagur, 1. mai, grundlógardagur og 1. november og jólaaftan eru frídagar aftaná kl. 12.

§ 6. Viðbøtur o.l.: stk. 1. Amboðspeningur, hækka við kr. 1,00 um tíman.

Stk. 2. skitið arbeiði, hækka við kr. 0,50 um tíman. Stk. 3, 4, 5 og 7. hækka til kr. 9,50 um tíman. Stk. 8. hækkar tilsvarandi lønarsáttmálanum í krónum.

stk. 9. Fyri at arbeiða við vandamiklum evnum, so sum glasfipur, 2.-komponent lakk, máling og annað, verður goldið kr. 160 eyka um tíman.

§ 9. Yvirtíðarlønir: Fyrstu 4 tímarnir, broyta til 40%. Stk 3, 100% av galdandi løn

§ 11. Seinkað arbeiði: Minsta gjald fyri uppmøting er fyri 2 tímar.

§ 19. Samstarvsavtala: Stk .1. Samstarvsavtala. Skoyta uppí. Fiskavirkarar og alarar. Stk. 2. Handverkarar, sum vanliga eru umfataðir av nevndu handverksgrein í stk. 1. men sum av og á, sum ein partur av arbeiðinum føra maskinur og lastbilar, eru umfataðir av hesi avtalu t.v.s. eisini í tí tíðarskeiði meðan maskinan ella lastbilurin verða førd (stk. 3. sama sum núverandi stk. 2)

§ 23. Arbeiðstíðin: Stk. 2. 11 tímars reglan sambært løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi. Mist handverkara inntøka orsaka av at handverkarin ikki fær møtt til arbeiðis vegna lógarásett forboð, sum t.d. eftir umhvørvis ella Arbeiðsumhvørvislóggávu, skal missurin endurgjaldast av meistaranum.

Generelt: Hækking av lønini við 15% fyri sveinar, serarbeiðarar og fastløntar.

Hækking av Eftirlønargrunni og Halgidagsgrunni.

## Í blaðnum hesu ferð: síða


| | |
|---|---|
| Nøkur uppskot, sum ikki vunnu frama undir samráðingunum | 2 |
| Eli Brimsvík: Vit eru rímuliga væl nøgd við samráðingarnar | 3 |
| Kaj Christiansen: 77 ára gamal handverkari og virkin sum fáur | 4 |
| Kristina Christiansen: Stórt vakstrarhús í urtagarðinum í fjøruti ár | 5 |
| Kristina og Kaj Christiansen: Søguligir „Brúgvasteinar“ | 6 |
| Kaj Christiansen: Barnaárini vóru hørð, 10 ára gamal fekk hann tuberklar | 7 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 20. november 2003 · **Blaðið er prentað: 3. november 2003**
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Telefon 31 15 48 · fax: 31 95 48 · teldupostur: hhvf@post.olivant.fo.

# Vit eru rímiliga væl nøgd við samráðingarnar



Fyrst er at siga, at vit vóru væl fyrireikaði til samráðingarnar, tá tær byrjaðu mikudagin 17. september kl. 10. Men tað vísti seg rættuliga skjótt, at langt var ímillum partarnar.

Og 30. september kl. 22.15 var mett neyðugt at boða semingsstovninum frá.

## Nývaldir og óroyndir semingsmenn

Tá semingsmenninir, komu upp í samráðingarnar sá ikki væl út, – samráðingarnar vóru í botni. Semingsmenninir, sum tá vóru nývaldir og óroyndir, megnaðu kortini at fáa glið á, – tað skal sigast til teirra rós.

7. oktober 2003 kl. 21 mettu vit, at vit – í hesum umfari – ikki fóru at røkka stórt longur, og gjørdu tí av at skriva undir nýggjan sáttmála. Og nú úrslitið fyriliggur, kunnu vit siga, at vit eru rímiliga væl nøgd.

Báðir partar tóku undir við soljóðandi semingsuppskoti:

## Lønarhækkan (grein 5)

Tann 1. oktober 2003 hækkar sveinalønin við 2,77 um tíman til 110,97 um tíman.

Tann 1. oktober 2004 hækkar sveinalønin við 2,72 um tíman til 113,69 um tíman.

## Eftirlønargrunnur (grein 17)

Tann 1. oktober 2003 hækkar gjaldið, sum meistararnir rinda í eftirlønargrunnin, við 2% til 4% av lønini.

Tann 1. oktober 2004 hækkar gjaldið, sum meistarar rinda í eftirlønargrunn, við 1,5% til 5,5% av lønini.

## Halgidagsgrunnur (grein 18)

Tann 1. oktober 2004 hækkar gjaldið, sum meistarar rinda í halgidagsgrunn við 0,5% til 1,5% av lønini.

## Fastlønarsáttmálin

Viðvíkjandi fastløntum og øðrum bólkum, sum fevndir eru av sáttmálaøkinum, verða framdar neyðugar broytingar samsvarandi frammanfyristandandi sátmálabroytingum.

***Kaj Christiansen:***

# 77 ára gamal handverkari og virkin sum fáur



Kaj Christiansen kann sigast at vera rættuligur havnarmaður.

Hann er 77 ára gamal, føddur í Havn 25. august 1926. Bæði foreldrini vóru havnarfólk. Pápin, Frits Christiansen, vanliga nevndur klokkarin, og mamman, Ebba, dóttir Petru og Dia á Lava.

Kaj og konan, Kristianna, búgva ovarlaga á Tinghúsvegnum, og tað er altíð áhugavert at støkka inn á gólvið hjá teimum. Tey geva sær altíð stundir til eitt prát, men eru kortini bæði virkin sum fá í teirra aldri.

Í kjallaranum hevur Kaj ein sera væl útgjørdan verkstað. Hann hevur bestu útgerð í landinum, tá talan er um at dreya træ.

At Kaj er hegnismaður er eisini mongum kunnugt. Og tí verður eisini mangan heitt á hann, tá serliga krevjandi træarbeiði skal gerast.



*Kristianna Christiansen:*

# Stórt vakstrarhús í urtagarðinum í fjøruti ár



Okkum dámar so sera væl at arbeiða í urtagarðinum, at royna ymiskar plantur, runnar og trø. Urtagarðurin hevur stóran týdning fyri okkum, sigur Kristianna.

Vit høvdu vakstrarhús í urtagarðinum í 40 ár, og har fingu vit alt at vaksa: víndrúur, piparfruktir, tomatir, agurkur, blaðselleri, charlottuleyk, gularøtur og mangt annað. Tað vaks alt árið.

Har sum, vakstrarhúsið stóð, hava vit nú ein lítlan køkshava við salatum, gularótum og øðrum nyttuplantum.

Kristianna er ættað av Strondum. Foreldur hennara vóru Poul Johannes F. Poulsen og Jóhanna, tey vóru bæði av Strondum.

Kristianna og Kaj giftust 2. desember 1952. Tey eiga trý børn. Sólfríða, sum er fødd í 1956, Heiðrikur í 1960 og Henry í 1968. Henry er búsettur í Fraklandi.



*Kristianna og Kaj Christiansen:*

# Søguligir „brúgvasteinar“



Sum vit síggja á niðaru myndini av urtagarðinum, er ein lágur snøggur grótgarður lagaður út frá húsunum, vestureftir.

Grótgarðurin er lagaður av rættuligum „brúgvasteinum“ frá gamla havnarlagnum í Havn. Sí mynd høgrumegin. Tá eystara bryggja varð víðkað fyrst í fimtiárunum vóru „brúgvasteinarnir“ tiknir upp og – tí betur – bjóðaðir fólki at keypa, sigur Kristianna.

Hon sigur, at hon minnist, at tey keyptu eitt less fyri 45 krónur, og tað var allar pengarnar vert. Vit halda grótgarðin vera vakran, og hann minnir okkum eisini á gamla havnarlagið, sum broyttist so nógv í fimtiárunum.

Fremst á niðaru myndini síggja vit eisini sermerktu „kopartjørnina“, sum tey hava í urtagarðinum, og hon hevur eisini sína søgu. Botnurin er úr kopari, og var upprunaliga „hattur“ (skermur), á eini útilykt, sum einaferð stóð vestanfyri Telegrafstøðina á Tinghúsvegnum. Útilyktin skuldi beinast burtur, og heppin var eg, teir bóðu meg bara fara við „hattinum“, sigur Kaj brosandi.



# Barnaárini vóru hørð, 10 ára gamal fekk Kaj tuberklar

Kaj byrjar barnaskúlan, 7 ára gamal, í 1933 í Gamla Kommunuskúla, skúlanum, sum í dag er ráðhús í Tórshavnar kommunu.


*Tuberklasjúklingar skuldu hava so nógva fríska luft sum gjørligt, og sengurnar vóru tí settar út.*

Tá Kaj var 10 ára gamal, var hann eitt longri tíðarbil illa fyri og ússaligur, og Zachariasen, sum tá var amtslækni, vildi tí hava hann lagdan inn á „Tuberklasanatoriið í Hoydølum“.

Hetta vóru óhugnalig boð at fáa, og Kaj minnist enn týðiliga, hvussu tung fótafetini vóru tann dagin, hann fór heimanífrá niðan í Hoydalar.

Kaj var innlagdur á Sanatoriið í Hoydølum 13. januar 1937. Har varð staðfest, at hann hevði tuberklar. Sjúkan var annars – milum fólk – vanliga nevnd „smittan“.

Hesin dagurin hevur sett djúp spor í sinnið. Hvørt einasta ár síðani, hevur 13. januar vakt sera sterkar kenslur. Tá rennur mangt og hvat fram fyri hann. Og Kaj roknar við, at tað fer at fylgja honum alt lívið.

## Avbyrgdir sjúklingar

Sjúklingarnir í Hoydølum vóru avbyrgdir. Teir høvdu ikki loyvi at fara longur enn niðan til brúnna um Hoydalsá, og hinvegin ikki longur oman enn til Boðanesgjógv.

Tað var hart, sigur Kaj avgjørdur, flestu sjúklingarnir, sum vóru innlagdir á Sanatoriið í Hoydølum roknaðu – innast inni – ikki við at koma livandi aftur úr Hoydølum.

## Kisturnar

Barnasálin er viðkvom, og tað var ikki lætt at vera vitni til, at so mong fólk verða løgd í kistu. Tað var partur av gerandisdegnum í Hoydølum, og tað sigur seg sjálvt, at slíkt setur síni spor í sinnið.

Eitt tað tyngsta var at síggja líkkisturnar koma og fara. Tómu kisturnar vóru vanliga koyrdar niðan við lastbili.

Og mangan var tað pápi Kaj, Frits Christiansen, sum koyrdi kistur niðan

… framhald á síðu 9




# Øll kunnu keypa virðisbrøv

Mangir løkir smáir gera stórar áir, siga vit. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum. Ganga fleiri saman um at gera íløgur, kunnu tey fáa teir fyrimunir, sum størri íleggjarar fáa. Íløguprógv kunnu keypast fyri smærri upphæddir – heilt niður í 1.000 krónur. Kaupthing hevur fleiri íløgufeløg at velja ímillum – t.d. feløgini »Norrøn partabrøv« og »Lánsbrøv í donskum krónum«.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

SANSIR TEL 355 355



*Magnusen, sanatoriulækni, ferðaðist saman við eini sjúkrasystir um alt landið at kanna og vaksinera. Her eru tey úti á bygd til arbeiðis niðri í fjøruni, í lendingini millum bátarnar. Legg til merkis, at Magnusen er í húðarskóm.*

Allir fiskimenn skuldu kannast, áðrenn teir sluppu til skips. Og teir, sum høvdu „smittuna“ sluppu ikki til skips. Tað var knívskorið.

Tað er ikki lætt at siga frá, hvussu tung løtan mangan var hjá hesum monnum, sum stóðu eftir í túninum og ikki sluppu til skips, sum teir høvdu ætlað.

## Ongin munagóð viðgerð

Møguleikarnir at basa sjúkuni tá vóru smáir. Mest sum einastu ráðini vóru: at hvíla nógv, eta feitan mat, spik, lýsi og at drekka nógva mjólk. Tey flestu vóru sett á tað man í dag kann kalla „fitikur“.

At ongin munagóð viðgerð var gjørdi, at sjúkan áhaldandi breiddi seg, og alsamt fleiri føroyingar fingu tuberklar.

Tí gjørdist eisini skjótt trongligt í Hoydølum.

*… framhald frá síðu 7*

og oman úr Hoydølum við lastbili sínum. So onki er at ivast í, at tað eisini hevur verið tungt hjá pápanum.

Mong av teimum, sum doyðu í Hoydølum, vóru avbygdarfólk. Tá vóru kisturnar vanliga koyrdar oman á kaiina, og vóru fluttar við skipum, sum tá sigldu millum oyggjarnar.

Kaj leggur dent á, at hetta vóru daprar tíðir fyri allar føroyingar, øll vóru onkursvegna rakt.

## Skipsmanningar

Kaj minnist væl, at mangan komu heilar skipsmanningar niðan í Hoydalar til tuberklakanningar. Og tá var tað ikki so sjáldan, at ein ella fleiri av manningini vóru verandi eftir í Hoydølum.

## Gamla og Nýggja hús

Fyrstu árini var bara tað eina húsið til sjúklingarnar í Hoydølum.

Seinni varð nýtt hús bygt. Tað nýggja húsið er tað, sum í dag er á vinstru síðu áðrenn man kemur til studentaskúlan í Hoydølum. Tað eldra húsið er hinumegin vegin, á høgru hond.

Sjúklingarnir, sum vóru harðast raktir lógu í „Gamla húsi“, og teir frægaru í

*… framhald á síðu 12*




FØROYA BANKI




LÍV

Føroya Lívstrygging · P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 318919

www.reproz.com




# flogfelag Føroya fólks

Beinleiðis úr Føroyum til Keypmannahavnar, Billund,
Reykjavíkar, Stavanger, Oslo, Aberdeen og London.

ATLANTIC AIRWAYS

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

… framhald frá síðu 9

„Nýggja húsi“. Kaj var so mikið frægur, at hann hevði song í „Nýggja húsi.“



Kaj saman við vinmonnum undir krígnum. Frá vinstru: Richard í Dali, Kaj Christiansen, Finn Mortensen og Ejler Rubeksen.

## Plásstrot í Hoydølum

Kaj var sjúklingur í Hoydølum í fýra mánaðir. Tá hann var útskrivaður, var tað ikki tí, at hann var sloppin av við „smittuna“. Tað varð vorðið so tronligt, at pláss var ikki til allar tuberklasjúklingarnar í Hoydølum. Og plásstrotið gjørdi, at fleiri tuberklasjúk havnarfólk vóru útskrivað. Men tey sluppu kortini ikki at gera sum tey vildu. Mong vóru „skýggjað“, og tað er eitt tað ringasta eitt menniskja kann koma út fyri.

Tað var ómøguligt at liva eitt vanligt lív, tá man hevði verið tuberklasjúkur, ella hevði „smittuna“.

Eftir at Kaj var útskrivaður var hann til „kontrol“ í Hoydølum 14’anda hvønn dag. Tá tóku tey blóðroynd og røntgenmynd av lungunum.

## Tuberklar í 4 ár

Kaj var tuberklasjúkur í 4 ár. Í 1940 var hann erkleraður frískur.

Smittan hevði kortini gjørt, at barnaárini vóru nógv merkt av sjúku og øllum sum fylgdi við „smittuni“. Eitt tað ringasta var, at Kaj ikki slapp at spæla sum onnur børn. Tað var eisini mangan sárt hjá honum at síggja, at hann varð „skýggjaður“. Hann var eisini javnan vitni til, at fólk t.d. „skáldaðu“ krúss ella kopp, sum hann hevði drukkið av.

Tá hann var „erkleraður“ frískur, var kortini eitt sera dapurt tíðarskeið av barnaárum runnið. Men sporini sita enn í sinninum.

## Úr gamla Kommunuskúla í Nonnuskúla

Tey 4 árini hann var sjúkur vóru á so mangan hátt tung.

Eina tíð eftir, at hann var útskrivaður úr Hoydølum, slapp hann sum eina roynd aftur í skúla. Men tað var ikki í Kommunuskúlan, har hann hevði gingið, áðrenn hann var smittaður.

Foreldrini mettu, at tað var betur, at hann fór í Nonnuskúlan. Nonnuskúlin var nærmasti granni í Villumsgøtu, har tey búðu, og tí var stutt hjá honum at fara í og úr skúla.

Og tá fríkorter var í skúlanum, og hini børnini sluppu út í skúlagarðin at

spæla, skundaði Kaj sær til hús. Og tá fríkorterið var liðugt, fór hann aftur í skúla.

Tað var ikki fyrr enn eftir annan heimsbardaga, at munagóð viðgerð og heilivágur vóru tøk, soleiðis at tuberklasjúkan kundi basast.



*Fyrsta skipið, sum Kaj var við at byggja frá byrjan var Norðlýsið.*

## Annar heimsbardagi

Um hetta mundið leikaði annar heimsbardagi á, og 9. apríl 1940 hertóku týskarar Danmark. Tá gjørdist støðan í Føroyum eisini spent, Føroyar vóru tá danskt amt.

11. apríl boðar Winston Churchill í bretska undirhúsinum frá, at „We are also at this moment occupying the Faroe Islands". Dagin eftir stevndu tveir oyðarar inn á havnarvág, men tað mundi latna um mangt hjarta, tá tað vísti seg, at herskipini ikki vóru týsk. Henda dagin boðaðu bretskir heryvirmenn amtmanninum frá, at teir fóru at seta hermenn á land, og at skipað fór at verða fyri sensuri av telegrafi, tráðleysari telefon og, at brævapostur fór at verða steðgaður.

Dagin eftir, 13. apríl, komu 5 bretsk herskip í Nólsoyarfjørð, og í fyrstu syftu vórðu einir 250 hermenn settir í land.

## Bretar taka fleiri bygningar í Havn

Til at hýsa hermonnunum vóru fleiri bygningar í Havnini tiknir t.d. Sjónleikarhúsið, Tórshøll og Havnar Klubbi.

Og tá eldur – nakað seinni – kom í Havnar Klubba, var Nonnuskúlin tikin, sum ein fyribilsloysn. Børnini, sum tá gingu í Nonnuskúlanum, vóru flutt í Gamla Komunuskúla at ganga í skúla. Hetta var kortini bert eitt stutt tíðarskeið.

Her kundu vit eisini skoytt uppí, at eingilsmennirnir fóru skjótt undir at byggja hópin av barakkum, sum teir so fluttu sítt virksemi í.

## Í læru á Tórshavnar Skipasmiðju

Tá barnaskúlin var lokin hevði Kaj hug at fara í læru, og 1. mai 1941 fór hann at læra til skipstimburmann á Tórshavnar Skipasmiðju.

Kaj lærdi á Tórshavnar Skipasmiðju í 5 ár, og var liðugur at læra 1. mai 1946. Tá var ikki vanligt at gera sveinastykki, men hann fekk sveinabræv (nevnt lærubræv) undirskrivað av stjóranum Kjartan Mohr 7. mai 1946.

## Lærubrævið listaverk

Lærubrævið hjá Kaj er í mangar mátar áhugavert. Fyrst er at nevna, at á lærubrævinum er bæði á enskum og týskum greitt frá læruni. Á enskum verður útbúgvingin nevnd „carpenter", og á týskum „zimmermann".

*… framhald á síðu 16*

Jolly®
www.jolly.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

STUÐLAR

Postboks 2 · FO-900 Vágur
Tlf. 37 30 64 · Fax 37 33 40
E-mail: sparsu@post.olivant.fo

Postboks 374
FO-110 Tórshavn
Tlf. 32 19 98 · Fax 32 19 97

FO-950 Porkeri
Tlf. 37 39 00 · Fax 37 39 03




Pf. Einars Prent · 31 49 29



petur & petur • 320870

# HAVNAR TIMBURHANDIL



*Havnar Timburhandil bjóðar tær alt tað, tær tørvar innan amboð, byggitilfar og búnýti.*

*Okkara prís- og tænastupolitikkur er grundarlagið undir tí framburði, ið hevur ført okkum fram á 1. pláss - og har ætla vit at verða verandi.*

*Við hesum í huga - vælkomin inn á gólvið.*

**KAPPINGARFØRIR PRÍSIR**
Havnar Timburhandil leggur dent á altíð at bjóða viðskiftafólki sínum kappingarførar prísir.

**STÓRT ÚRVAL**
Í samstarvi við m.a. Byggekram í Danmark fært tú størsta úrvalið í landinum.

**TÆNASTA**
Vit leggja okkum eftir at bjóða viðskiftafólki okkara bestu tænastu, vegleiðing og trygd fyri røttum keypi.

**HEILDARLOYSNIR**
Vit átaka okkum at geva tær tilboð uppá alt tilfar, ið skal nýtast til m.a. vanlig sethús og størri ídnaðarbyggingar.

HT TILFAR

Byggekram

**Tórshavn: tel 31 12 50 • Kambsdalur: tel 44 44 41 • Sandur: tel 36 11 50**
www.havnar.fo • e-mail: ht@ht-tilfar.fo

… framhald frá síðu 13

Eitt annað, sum ger lærubrævið serliga áhugavert er, at listamaðurin Jacob Olsen, millum manna nevndur Zahle, hevur prýtt lærubrævið við síni sera vøkru hondskrift, so lærubrævið kann tí eisini sigast at vera listaverk. Lærubrævið er so mikið vakurt og áhugavert, at tað var upplagt at hava tað í litum á forsíðuni.

Meðan Kaj lærdi, gekk hann í tekniskum skúla um kvøldarnar frá kl. 19 til kl. 22 gerandiskvøld.

## Lærlingalønin

Lønin í lærutíðini var soleiðis ásett í lærusáttmálanum:
Fyri eina viku:
1. árið kr. 5,-
2. árið kr. 6,-
3. árið kr. 8,-
4. árið kr. 12,-
5. árið kr. 15,-

## Skipabygging

Fyrsta skipið, sum Kaj var við at byggja frá byrjan var Norðlýsið. Og sigast má, at Norðlýsið er væl bygt. Hvørt mansbarn í Føroyum kennir í dag Norðlýsið, sum man kann siga er „still going strong“.

Av øðrum skipum, sum Kaj var við at byggja á Tórshavnar Skipasmiðju er at nevna Norðberg og Kúrberg, sum var bygdur til Johan í Hoyvík.

## Havnar Handverkarafelag

Tá Havnar Handverkarafelag varð stovnað 12. februar 1950 vóru ikki nógvir útbúnir handverkarar í Havn.

Á stovnandi aðalfundinum møttu 32 mans, og tað mundi vera dasti av teimum útbúnu handverkarunum, sum tá vóru í Havnini.

Á stovnandi aðalfundinum varð Kaj valdur til tiltakslim í nevnd felagsins.

Men tá Halgrím Rein, sum var nevndarlimur, stutt eftir byrjaði egið virki, og tók seg úr nevndini 30. apríl, gjørdist Kaj næstformaður í Havnar Handverkarafelag.

Og á aðalfundinum árið eftir, 15. februar 1951, varð Kaj afturvaldur í nevndina.

Tað hendi nógv hesi fyrstu árini hjá Havnar Handverkarafelag. Eitt sum Kaj minnist væl, og sum hann metir hevði stóran týdning var, at teir fingu í




*Kaj lærdi á Skipasmiðjuni árini 1941-1946. Her avmyndaður (vinstrumegin) saman við Alfred Hofgaard, sum í mong ár var nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag.*



*Norðberg avmyndaður flaggskrýddur á veg úr bakkastokki.*

Eitt dømi, sum ikki sigur so lítið er, at av teimum 32 monnunum, sum vóru við, tá Havnar Handverkarafelag var stovnað hevur meira enn helmingurin arbeitt á Tórshavnar Skipasmiðju. Kaj nevnir hesar:

Carl Andreas Carlsen, sum eitt skifti var formaður.
Ólavur Dalsgarð
Louis Eystberg
Wenzel Hammer
Alfred Hofgård, nevndarlimur í nógv ár.
Carl Midjord, eisini nevndarlimur.
Peter Midjord, formaður í mong ár.
Ásmund Mikkelsen
Flemming Niclasen (í Gong)
Eskild Nygård
Pauli Næs
Esmar Olsen
Hans D. Petersen
Niels Holm Petersen
Hallgrím Rein
Súni Thomsen
Olivar C. Thomsen
Helgi Øster, sum var fyrsti formaður felagsins.

sáttmálan, at leygardagur skuldi bert vera hálvur arbeiðsdagur. Tá var „week end“ kl. 12 leygardag, og tað var ein góð broyting.

## Tórshavnar Skipasmiðja

Sum nevnt lærdi Kaj á Tórshavnar Skipasmiðju, og hann sigur, at skipasmiðjan hevur havt sera stóran týdning fyri føroyskt handverk. Og sjálvur hevur hann bert tað allarbesta at siga um Tórshavnar Skipasmiðju.

## Glyvursnes og sethúsabygging

Tá Kaj var liðugur at læra, hevði hann hug at royna sjólívið. Hann arbeiddi kortini sum sveinur einar tveir mánaðir á Skipasmiðjuni, áðrenn hann fór út at sigla.

Hann fekk kjans við Glyvursnesi, sum fyri tað mesta sigldi til og úr Føroyum í Eystursjógvin og í Miðjararhavið.

Glyvursnes flutti nógv timbur til Føroya úr Finnlandi. Úr Føroyum fluttu teir saltfisk til Miðalhavslondini og lýsi til Danmarkar. Teir sigldu eisini stykkja-

… framhald á síðu 20




STATOIL

P/F STATOIL FØROYAR
Viðarnes, 100 Tórshavn
Tel 34 35 00, Fax 34 35 01









TÓRSHAVNAR
SKIPASMIÐJA

… framhald frá síðu 17

góðs til Føroya, ofta úr Pólandi og Eystur Týsklandi.

Kaj sigldi við Glyvursnesi árini 1946-47, tá hann fór í land og fekk arbeiði hjá Peter Michelsen, sum tá stóð fyri rættuliga nógvum byggiarbeiði í Havn. Talan var í stóran mun um sethúsabygging. Hann var í arbeiði hjá Peter Michelsen árini 1948-49.



*Ein „bryggjukista“ verður „sjósett“, tá Vestara bryggja varð bygd í fimtiárinum.*

## Havnin var ikki trygg

Tá tann fyrsta veruliga havnarútbyggingin í Havn hevði staðið sína roynd eina tíð var greitt, at neyðugt var at byggja út bæði á Eystaru- og Vestaru vág, áðrenn Tórshavnar havn kundi roknast fyri at vera trygg vetur og summar.

Og áðrenn annar heimsbardagi brast á vóru eisini ítøkiligar byggiætlanir frammi. Men av krígsávum vóru hesar ætlanir fyribils av ongum.

## Havnarbygging á Eystaruvág

Tá ið kríggið var av, og teir mongu bretsku hermenninir vóru farnir av landinum, var farið at kanna, hvussu skilabest var útbyggja havnarlagið í Havn. Og í 1947 var klárt at fara undir at byggja eina 60 metur langa bryggju á Eystaru vág. Arbeiðið varð boðið út, og inn komu trý tilboð. Havnarnevndin mælti býráðnum til at taka av lægsta tilboðnum, sum var frá Steingrími Winther, byggimeistara. Og á sumri 1947 varð sáttmáli undirskrivaður.

## Múrurin í Havn fellur

Út móti jólum 1947 vóru umleið 30 metrar (av teimum 60) av nýggja bryggjumúrinum stoyptir upp í fulla hædd. Men 11. januar 1948 brast eitt rættuligt ódnarveður á, sum gjørdi at arbeiði varð steðga. Í ódnarveðrinum var nógvur rennisúgur, og tá sjógvur í óløgunum fyltist innanfyri upp í fulla hædd og uttanfyri niður um miðalstøðuna, var sera stórt trýst á múrin, innanífrá. Í fyrstu atløgu fór múrurin at ridla og datt umsíðir niður. Seinni varð sagt, at hevði verið bíðað við teimum ovastu 1,5 metrunum hevði múrurin tolað trýstið.

## Steingrím Winther

Tá ódnarveðrið var hasað av var meginparturin av stoypiarbeiðnum skolað burtur. Steingrím Winther, sum tá var 63 ára gamal, og alt sítt lív hevði

verið arbeiðstakari og havt – eftir føroyskum viðurskiftum – fleiri stórarbeiði og verið kendur um alt landið, tók tað so fast, at hann slepti virkinum og flutti til Danmarkar, har hann fann sær aðra vinnu.

Henda syndarliga hending gjørdist dyggur fíggjarligur smeitur fyri báðar partar.

## Nýggj bundin útbjóðing í Danmark

Umsíðir valdi býráðið at bjóða arbeiði út av nýggjum, men hesuferð sum bundin útbjóðing í Danmark. Býráðið fekk tvey tilboð, og gjørdi av at taka av tilboðnum frá donsku byggifyritøkuni A/S Kampsax. Men árið 1948 var næstan runnið, áðrenn endaligur sáttmáli varð undirskrivaður. Leivdirnar, sum lógu eftir frá fyrra byggimeistaranum, skuldi Kampsax beina burtur sum rokningaarbeiði.

Áðrenn Kampsax fór undir arbeiði varð søkt eftir fólki, og ein av teimum, sum var við, tá arbeiðið byrjaði, var Kaj Christiansen.

## Fleiri havnarútbyggingar

19. oktober 1950 handaði Kampsax Tórshavnar havn nevndu havnabygging. Men áðrenn hetta arbeiði var liðugt hevði býráðið tikið støðu til fleiri aðrar útbyggingar, bæði eystaru og vestaru megin, t.d. brimgarð úr Gulakletti, langa bryggju fram við Rundingi, og oljubryggju vestaru megin. Og var tað Kampsax sum kom at standa fyri meginpartinum av hesum arbeiði.

Tá støða skuldi takast til ein tann seinasta partin av havnaútbyggingunum, tóku trupulleikar seg upp. Hóast Kampsax átti lægsta tilboðið stóð á jøvnum í býráðnum, tá atkvøtt var um hvør skuldi standa fyri hesum arbeiði. Og tí mátti at enda kastast lut um hvør skuldi gera hetta arbeiði. Í hesum lutakasti var føroyska byggifelagið Lamhauge og Waagstein heppið og vann lutakastið. Tann 26. august 1954 tók kommunan yvir arbeiðini, sum Kampsax hevði gjørt.

## Lamhauge og Waagstein

Kaj arbeiddi hjá Kampsax árini 1949 til 1954, tá hann fór í starv hjá Lamhauge og Waagstein.

*… framhald á síðu 24*



*Á myndini høgrumegin er hópur av arbeiðsmonnum og handverkarum á veg til Grønlands, tá Føroyingahavnin skuldi útbyggjast. Myndin er tikin í Julianehåbsvíkini 12. mai 1954.*

Alt vanligt el-tilfar
Skjót og trygg tænasta

## Heildarveitarar av:

- **ABB** El-motorum
- **DANFOSS** El-tilfari
- **OSRAM/Philips** vørum
- **NORSELIGHT/IBAK** Ljóskastarum
- **BEHA HEDO** Kabússum
- **ÚTGERÐ TIL STÓRKØKAR**
- **SKIPSKAÐALUM**
- **FREON**

**Telefonin svarar alt samdøgrið!**



team85

Stovnað 1935

# PF LEIF MOHR

Hoyvíksvegur 53 · 100 Tórshavn · Tel 35 12 20 · Fax 35 12 30 · lm@lm.fo · www.lm.fo

Fransbreyð
...breyð frá Frans!

Fr. Restorff

PÓLAR

Akkumulatorar
til øll endamál

Pf. Einars Prent · 314929




Alt innan bátaútgerð



VOLVO
PENTA



GPS-plottarar
og sjálvstýrarar frá
Cetrek®

Bátatænastan
Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo
www.batataenastan.fo



*Tá umrødda arbeiði í Føroyingahavnini var liðugt.*

… framhald frá síðu 21

Í hesum sambandi fór hann 1. mai 1954 til Grønlands at arbeiða. Har var eitt rættuliga umfatandi arbeiði, sum Lamhauge og Waagstein skuldi gera í Føroyingahavnini.

Tá Kaj kom aftur til Føroya var hann m.a. við at byggja Bacalao, Hafnia og loranstøðina á Eiði. Hann var eisini við, tá „lok“ var lagt á „Havnar á“, frá Vaglinum niðan til Ebenezer. Hetta vóru alt arbeiði, sum Lamhauge og Waagstein stóðu fyri.

## Telegrafstøðin

Í 1962 søkti Telegrafstøðin eftir húsavørði. Kaj søkti og fekk starvið. Og sigast má, at hann hevur trivist væl á Telegrafstøðini. Har arbeiddi hann sum húsavørður í 33 ár, til hann fór frá vegna aldur í 1993.

Kaj nevnir, at árini á Telegrafstøðini vóru í mangar mátar áhugaverd. Ikki minst, tá antennur vóru settar upp kring oyggjarnar. Í hesum sambandi hevur Kaj t.d. arbeitt á Fugloynni, á Brúnaskarði, Eysturhøvda og á Hestinum, bert fyri at nevna nøkur dømi.

## Sløkkiliðsmaður

At vera sløkkiliðsmaður má sigast at vera álitisstarv. Í 1947 gjørdist Kaj sløkkiliðsmaður, og røkti hetta arbeiðið í samfull 45 ár.

Um sama mundi sum hann legði starvið frá sær sum húsavørður á Telegrafstøðini gavst hann eisini sum sløkkiliðsmaður í Tórshavnar Sløkkiliði.

## Frítíð og frítíðarítriv

Eitt sum sermerkir Kaj er, at hann altíð hevur verið framúr virkin, og frítíðarítrivini hava verið fleiri.

Í kjallarunum hevur hann ein væl útgjørdan verkstað, (sí mynd á síðu 4) og eitt av hansara stóru áhugamálum er fínligt træarbeiði, – serliga væl dámar honum at dreya. Hann hevur eisini ferðast nógv. Men tað mest tíðar-

… framhald á síðu 26







## AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarir:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

… framhald frá síðu 24

krevjandi frítíðarítrivið er urtagarðsarbeiði.

Kemur tú í prát við Kaj, so gerst tær skjótt greitt, at hann eisini er rættuliga kønur urtagarðsmaður. Og hevur tú áhuga, so gevur Kaj sær altíð stundir til ein túr í urtagarðin, og har hevur hann mest sum altíð eitthvørt áhugavert at fortelja.

## Barnadreymur

Kaj sigur, at alt hann kann minnast, hevur hann verið hugtikin av tí, sum livir og grør. Ein av barnadreymum hansara var at fáa sær gartnaraútbúgving. Hinvegin so prógvar urtagarðurin, at evnini til gartnaraarbeiði eru góð.

Kaj fortelur, at tey høvdu vakstrarhús í urtagarðinum í 40 ár. Har vuksu víndrúur, piparfruktir, tomatir, agurkir, blaðselleri, charlottuleykur, gularøtur og mangt annað. Tað vaks alt árið, sigur Kaj. Men fyri nøkrum árum síðani legði eg til merkis, at konstruktiónin var viknað nakað. Og fyri at sleppa undan, at tað skuldi farast í illveðri, gjørdu vit av at taka vakstrarhúsið niður. Og stutt aftaná kom eisini rættuligt illveður, sum – um illa vildi til – kundi gjørt skaða.

Har sum vakstrarhúsið stóð, hava vit nú ein lítlan køkshava við salatum, gularótum og øðrum nyttuplantum. Rabarbur skera vit tríggjar ferðir um árið, men sjálvandi – onki er í dag sum fyrr.

## Um urtagarðin

Urtagarðurin hevur í dag eina hóskandi støðd fyri okkum, sigur Kaj, hann man

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

- alsamt í vøkstri

- greið boð um Havnina
www.torshavn.fo
SNARSKIVAN



*Tórshavnar Sløkkilið hevði venjingar úti á Reyni. Kaj stendur høgrumegin Rubekk, sum er tann aftari við „sproytuni“ í hond. Kaj var sløkkiliðsmaður árini 1947-1993.*

liggja um einar 100 fermetrar. Grasvøllurin man vera ein triðingur.

Ein lágur snøggur grótgarður er lagaður vestureftir út frá ovara enda av húsinum. Omanfyri vaksa alskyns prýðisplantir, stórar staudir, fínar summarblómur, exotiskir runnar og smá trø.

Grótgarðurin er lagaður av „brúgvasteinum“ frá gamla havnarlagnum í Havn. Teir bjóðaðu mær at keypa eitt less fyri 45 krónur. Eg helt tað vera pengarnar vert. Tað var fyrst í fimtiárunum, tá teir víðkaðu Eystaruvág.

## Tíðarkrevjandi arbeiði

Tað er týðuligt, at nógv og drúgt arbeiði liggur í hesum fjølbroytta urtagarði. Tað krevur nógv arbeiði at halda urtagarð snøggan. Tað er ongantíð friður, tú mást ofta út við rívuni og saksinum, tú mást alla tíðina hava eyguni við tí heila.

Eg havi altíð hildið tað verið stuttligt at arbeiða við hesum. At sáa, taða, vatna, lúka og so hetta at fylgja við, hvat hendir í havanum. Og so verða allar restir frá húsarhaldinum komposteraðar og grivið niður í urtagarðinum.

## Sólur og fuglabað úr kopari

Miðskeiðis í urtagarðinum stendur eitt prýðiligt sólur á einum vøkrum steini. Og skamt ífrá ein pinkalítil tjørn, sum er eitt sjáldsamt lítið „fuglabað“. Botnurin er úr kopari og var upprunaliga skermur (hattur) á eini útilykt, sum einaferð stóð vestanfyri Telegrafstøðina á Tinghúsvegnum í Havn. Útilyktin skuldi

… framhald á síðu 30

SUZUKI

www.suzuki.fo



nýggjur

IGNIS

Fæst eisini sum 4x4

Einars Prent · Tel. 31 49 29

Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og verkstaður

Varðagøta 75 · FO-100 Tórshavn · Tel. 31 33 75 / 21 33 75 · Fax 31 14 95

Eykalutir

- til flest allar bilar!

ama

Landsins størsta
goymsla av
eykalutum til bilar

Postboks 3061
Fo-110 Tórshavn,
tel 31 3816

BIRGIR KROSSTEIG
Múrarameistari
Jónas Broncksgøta 33A

Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896



# RÚNI SØRENSEN
## Snikkarameistari
✆ 31 27 00 • 21 27 00

- allar umvælingar
verða gjørdar,
bæði innan- og uttandura!



team85



# Sól & Klipp

Smyrilsvegur 6
Tel 31 25 11

Garðsgøta 11
Tel 31 50 69



*Kaj var sløkkiliðsmaður í 45 ár.*

*… framhald frá síðu 27*

beinast burtur, og Kaj sigur, at hann helt „hattin“ vera vakran og synd at koyra burtur. Og heppin var eg, eg hevði ikki meira enn hálvtalað orð, so bóðu teir meg bara fara við honum. Og her hevur hann gjørt góða nyttu.

## Smáfuglurin

Okkum dámar so væl smáfugl, og endamálið við tjørnini var at fáa smáfugl at vitja og trívast í urtagarðinum. Og tað hevur eydnast. Her koma nógvir smáfuglar, bæði summar og vetur.

Ein kvørkveggja hevur í fleiri ár gjørt sær reiður í urtagarðinum. Tær eru diskretar, kvørkveggjurnar, tær ansa sær væl, tá tær fara og koma til reiðrið í runninum. Tað var av berari tilvild, at eg uppdagaði reiðrið, ein dagin eg skuldi klippa runnin. So tær duga væl at fjala seg fyri kettunum.

## Forvitnisligir runnar

Í urtagarðinum er hópur av forvitnisligum runnum, sum eru komnir úr mongum ættum. Onkrir av runnunum vóru plantaðir sum fræ, aðrir byrjaðu sum avleggara. Vit hava eisini eitt kastanjutræ, sum vit plantaðu sum kastanjunøtir og drivu upp í vakstrarhúsinum, tað eru nú eini 10 ár síðani.

Eg havi altíð okkurt við í skjáttuni, tá eg havi verið og ferðast. Mær dámar eisini væl at lata onnur fáa burturav. Vit eru nógv, sum dáma væl tað, sum grør, sigur Kaj.

## Runn frá Nikita Krustjov

Hygg hasin runnurin, sigur Kaj, og peikar. Hann er av grøvini hjá Nikita Krustjov, kenda aðalskrivaranum í Sovjetsamveldinum.

Á einari av mínum mongu ferðum har eysturi var eg einaferð í einum ferðalagi, sum vitjaði gravstaðin hjá Krustjov. Og har fekk eg eyga á ein so penan runn sum freistaði. Men eg mátti ansa mær, vildi helst ikki koma í hóslag við sovjetisku uniformarnar.

Men tíðin rennur av stað, nú eru tað eini 20 ár síðani, og runnurin er vaksin væl. Pettið, sum eg hevði heim við heimaftur, var bara einar 10 sentimetrar.

Kaj hevur ferðast nógv í síni frítíð, bæði einsamallur og í ferðaløgum. Hann nevnir fleiri áhugaverdar ferðir: Kaukasus, Kiev, Odessa og aðrastaðni við Svarta Havið.



*Kaj arbeiddi hjá Lamhauge & Waagstein, tá Havnar á fór undir lok, frá Vaglinum niðan til Ebenezer. Tað arbeiðið varð gjørt í 1957.*

skeiðum uttanlands fyri at dagføra kunnleikan.

## Skeið í Danmark

Og hugin hevur hann góðan. Fyri stuttum teknaði hann seg til eitt slíkt skeið, sum verður í Danmark í komandi viku. Og hann gleðir seg, tað er spennandi og áhugavert, sigur Kaj.

## Eingin at seta við

At enda fara vit at nevna, at Kaj er rættuliga harmur um, at ikki fleiri hava hug at dreya træ.

Tað er sjálvandi umráðandi at hava henda førleikan í Føroyum. Hann nevnir, at teir eru tveir, sum hava serliga stóran áhuga á hesum øki, hin er Ole J. Nielsen í Leynum.

Teir eru kortini serfrøðingar á hvør sínum øki. Ole J. Nielsen, er kendur fyri sínar vøkru og „hárfínu“ lampuskermar, meðan Kaj við síni útgerð t.d kann dreya „súlur“ til trappur, sum eru upp í 2,75 m. langar. Kaj hevur sjálvur longt dreyubonkin.

Teir báðir práta altíð saman, tá høvi býðst. Vit støkka javnan inn á gólvið hjá hvørjum øðrum, og hava havt manga hugnaliga løtu saman.

Kaj vónar kortini, at fleiri fara at vísa áhuga, og um so skuldi verið, so eri eg fúsur til eitt prát, og um gjørligt at veita eina hjálpandi hond, sigur Kaj at enda.

## Hevur bestu útgerð í landinum

Í kjallaranum hevur Kaj ein sera væl útgjørdan verkstað. Hann hevur bestu útgerð í landinum, tá talan er um at dreya træ.

At Kaj er hegnismaður er eisini mongum kunnugt. Og tí verður eisini mangan heitt á hann, tá serliga krevjandi træarbeiði skulu gerast. Sum dømi kann nevnast, at boð vóru eftir Kaj, tá Havnar Kirkja seinast varð umvæld, og tá serliga krevjandi arbeiði skuldi gerast í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi.

Kaj kann sigast at vera serfrøðingur, tá talan er um umvælingar av gomlum virðismiklum trælutum, og tá er neyðugt at hava servitan.

Tað er umráðandi at fylgja væl við øllum sum hendir á økinum, sigur Kaj, og tí hevur hann eisini verið á mongum




Eydnan er at hava ein at fylgjast við. Ein frítíðartrygging gongur í tínum fótafetum og verjir ímóti, at tú og tíni kæru koma fíggjarliga illa fyri av eini vanlukku.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo